gult cyan magenta svart





## Honda Intelligent Driver System

Japanska stjórnin hevur givið Honda, sum tí fyrstu bilfyritøkuni í Japan, loyvi at brúka framkomnu radarastýrdu trygdarskipanina, HIDS, sum stýrir bilinum inn á rætta kós, um hann fer út av vegnum, uttan at bilførarin vil tað.

**Kelda: Motor Magasinet**



## Norskur el-bilur til Danmarkar

Think Nordic latið upp eina søluskrivstovu í Keypmannahavn - og er Danmark harvið tað næsta landið. Service og klárgering av el-bilinum Think taka Ford fyritøkurnar Scanidam og Hertz sær av.

**Kelda: Motor magasinet**

## Nýggjur Proton í 2001

Malaysiska Proton bilaverksmiðjan kemur við einum nýggjum bili í 2001. Proton Waja kemur sum sedan, MPV og off-roadari.

**Kelda: Bilen Motor & Sport**

# BMW X5 til brattlendi og motorvegin




*BMW telist nú eisini millum tær bilaverksmiðjurnar, sum gera fýrahjólstrektar bilar*

*Magnus Gunnarsson*

BMW bilverksmiðjan setti sær høg mál, tá teir komu við X5, ið trekkjur á øllum fýra hjólunum og skal klára seg í brattlendi og á motorvegnum. Hesir bilar verða vanliga nevndir SUV (Sports Utility Vehicle), men BMW kallar X5 fyri SAV (Sports Activity Vehicle).

### Sum ein persónbilur at koyra

Frá BMW verður sagt, at teir ikki hava gjørt nakra neyðsemju viðvíkjandi koyrieginleikunum, tí X5 skal vera líka so góður at koyra, sum teir stóru BMW bilarnir vanliga eru tað.

Hetta ljóðar mótsigandi, men tað letur seg gera, tá X5 ikki er ein jeepur burturav. Bilurin hevur permanent trekk á øllum fýra hjólunum, har 62 prosent av kraftini verður yvirførd til bakhjólini og 38 prosent til forhjólini.

Tað er ein undarlig kensla at seta seg við rættið á X5. Alt virkar sum á einum vanligum BMW. Munurin er, at tú situr hægri og útsýnið verður harvið betri.

Tann automatiska stillingin av hæddini ger, at bilurin altíð hevur somu hædd og flýtur beint, um hann er lessaður.

### Vørubilur við dieselmotori

4.4 litra V8 motorurin er so ljóðleysur, at hann næstan ikki hoyrist.

X5 fæst eisini við einum 6 syl. 3.0 litra dieselmotori. Tann bilurin kostar her hjá okkum sum vørubilur 487.000 krónur harav kr. 96.000 eru mvg.

BMW X5 hevur fingið so góða móttøku í USA, at BMW hevur ætlanir um at gera ein X7 til ár 2004 og ein X3 til 2005.

Aðrir vilja eisini hava ein bita av køkuni. Nú eru Audi A6 Allroad og Volvo V70 XC komnir á marknaðin, og Saab hevur ætlanir um ein frítiðarbil av hesum slagnum.

# Bilar til framsýningar og á uppboðssølu




*Bjørn á Heygum stóð fyri uppboðssøluni hjá Bilfríðkuni leygardagin*

*Magnus Gunnarsson*

Seinasta leygardag kl 10.00 byrjaði upboðssølan av bilum úti á Bilfríðkan í Smiðjugerði, har Bjørn á Heygum, advokatur, var uppboðsseljari. Fitt av fólki var samankomið, bæði at forvitnast og at bjóða uppá bilarnar.

### Eisini sjálvboðin uppboðssøla

Hesar uppboðssølur eru ofta einar tvær ella tríggjar ferðir um árið, alt eftir hvussu nógv hevur hópað seg upp, sigur Bjørn á Heygum.

Hann hevur avtalu við Bilfríðkan um at hava uppboðssølurnar har. Treytirnar við hesum uppboðssølum eru, at goldið verður kontant ella at veitt verður bankatrygd fyri upphæddini. Onki minstamark er, og bilarnir verða seldir til hægstbjóðandi, sum keypa uppá egna risiko.

Nakrir bilar vóru eisini til sjálvbodna uppboðssølu, har kunnu tey, sum eiga bilarnar, seta eitt minstamark fyri, hvat tey vilja hava fyri teir.

### Orkusparandi dieselbilar

Samstundis var opið hús, har bjóðað varð kaffi og køkur. Eisini var høvi at royna teir nýggjastu dieselpersónbilarnar hjá Fiat og aðrar brúktar bilar.

Fiat Brava og Punto hava teir nýggju framkomnu Unijet Common Rail Turbo dieselmotorarnar við Intercooler, sum geva góða kraft, og eru sera orkusparandi.

Báðir hava teir 1,9 litra motorar. Brava hevur 105 hk og koyrir 18,5 km/l, og Punto hevur 80 hk og koyrir heilar 20 km fyri hvønn litur.

gult cyan magenta svart






*Teimum, sum koyra Saab, dáma væl tann haldgóða svenska kvalitetin og tær øðrvísi og vælumhugsaðu loysnirnar, sum Saab bilarnir hava*

**Myndir: Jens Kristian Vang**

## Saab 9-5 S.E. Sedan

Motorurin 4 syl.
2.0t Ecopower 16V
150 hk
0-100km/t 9,8 sek / 5 gear
Bensinnýtsla 10,7 km/l
Dekkstødd 205/65-15
Stødd og vekt
Longd 480,5 cm
Breidd 179,2 cm
Hædd 144,9 cm
Eginvekt 1500 kg
Totalvekt 2050 kg

Viðførisrúm 450 litrar

Prísur 343.300 kr
(Saab 9.5 fæst úr 289.800)

Søluumboð
John P. Vilhelm
Sp/f
Yviri við Strond 4
FO-110 Tórshavn
Telefon 315054

# Saab luksusbilur við trygd sum vørumerki

*Magnus Gunnarsson*

Saab 9-5 er komin fyri Saab 9000, sum fyrstu ferð kom á marknaðin í 1984. Hetta var fyrstu ferð, at Saab loyvdi sær at kappast við teir stóru prestigubilarnar. Ikki kann sigast annað enn, at Saab 9-5 klárar seg væl í kappingini við stóru týsku og japansku bilmerkini, bæði hvat viðvíkur komfort og koyrieginleikum. Eisini er 9-5 ein tann rúmligasti í klassanum.

### Sum í einum flúgvara

Við at seta seg við rættið á einum Saab 9-5 merkist, at bilurin er gjørdur á eini verksmiðju, sum hevur við flogfør at gera.

Instrumentbrettið minnir um eitt cockpit og kann ikki vera stórt betur innrættað. Saab 9-5 hevur eitt nýtt upphang aftan, ið gevur góða javnvág og ger bilin sera stúttan og tryggan í svingum.

### Trygd sum vørumerki

Trygd hevur verið eitt av vørumerkjunum hjá Saab. Bæði tá um aktivu og passivu trygdini viðvíkur livir Saab 9-5 upp til tað, hann ber orð fyri: sum ein av teimum mest tryggu bilunum yvirhøvur.

Á listanum yvir útgerð er m. a. dupult airbag, síðuairbag til høvur og kropp, ABS bremsur og tær aktivu Saab Active Head Restraint (SAHR) nakkapúturnar framman, ið eru ein uppfinning hjá Saab.

Bilurin hevur innbygdar tokulyktir og einar forlyktir, ið geva sera gótt ljós, informatiónsdisplay, fartpilot, night panel, sentrallás við fjarstýring, el-síðurútar, elspegl við hita og hita í setrunum.

### ACC klimaanlegg og Ecopower motor

Við ACC klimaanlegginum ber til at hava sama hita inni í bilinum alt árið, um man vil tað. Hetta er eitt sera framkomið klimaanlegg, har bilføraranum ikki nýtist at hava sama hita sum hini í bilinum.

Saab Ecopower motorurin er eitt konsept, ið gevur góða kraft, samstundis sum hann er umhvørvisvinarligur og orkusparandi. Skipanin regulerar allar týðandi funktiónir, so motorurin altíð arbeiðir so reint og orkusparandi sum møguligt. Bilurin, Sosialurin royndarkoyrdi, hevur ein 2.0t Ecopower motor við 150 hk.

Teimum, sum koyra við Saab, dáma væl tann haldgóða svenska kvalitetin og tær øðrvísi og vælumhugsaðu loysnirnar, sum Saab bilarnir hava. Teir hava allar sínar persónligu eginleikar í varðveitslu, hóast General Motors hevur keypt verksmiðjuna.




